Jenis av Rana:

# Lurtið heldur eftir Margrethe

**Nýggjársrøða løgmans var rætt og slætt vánalig, sambært Jenis av Rana. Drotningin fær annað skoðsmál**

RØÐA

*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Leiðarin fyri næststørsta andstøðuflokkin, Jenis av Rana, heldur ógvuliga lítið um røðuna hjá Jóannesi Eidesgaard nýggjársaftan. Røðan hjá løgmanni var vánalig. Jenis av Rana hevur ikki eitt einasta positivt orð at siga um røðuna hjá politiska leiðaranum í Føroyum, tá vit mánamorgunin høvdu hann í telefonini. Harvið er ikki sagt, at yvirhøvdið fyri danska ríkið fær somu skoðsmál. Hennara røða var frálík.

– At hoyra drotningina var fantastiskt. Hon helt eina góða, fevnandi og heita røðu, har grundleggjandi virði vórðu viðgjørd, sigur Jenis av Rana.



*Margrethe bestod med glans – men Jóannes fall nýggjársaftan, sambært Jenis av Rana*

Men so er tað eisini liðugt við teimum meira jaligu orðunum.

– Har var onki nýtt í nýggjársrøðu løgmans – ikki ein einasta nýhugsan. Hatta var politisk agitering, sigur Jenis av Rana.

– Eg gjørdist meira royalur enn nakað annað, sigur Jenis av Rana skemtandi.

### Sjálvfylgjur

Tað, sum serliga harmar formann Miðfloksins, er, at løgmaður tosar um politiskar sjálvfylgjur, sum hann tekur til. Hann heldur eisini, at løgmaður í fleiri førum stórliga mistekur seg.

– Bæði í sambandi við útlendingar og øll skulu hava somu møguleikar er ikki samsvar millum, hvat løgmaður sigur, og hvat samgongan vísir í verki. À tí ríkisrættarliga er tað aftur hendan sama endurtøkan við ongum nýggjum, sigur Jenis av Rana.

Eisini á øðrum økjum, eitt nú við neyðhjálpini til Asia, er Jenis av Rana skuffaður av løgmanni og samgonguni.

– Tann útrættað hondin er kørg, sigur Jenis av Rana.

### Alt politisk burtur

Røðan hjá løgmanni nýggjársaftan eigur ikki at vera so flokspolitisk, heldur Jenis av Rana. Tað politiska stríðið eigur at vera lagt afturum. Hann heldur ikki, at tað í longdini verður spennandi við tílíkum nýggjársrøðum sum hana fyri fýra døgum síðani.

– Verður nýggjársrøða løgmans útvíðkað við meira manifestatión, so haldi eg, at tað er nøkur meining í henni longur, sigur Jenis av Rana.

Spurdur, hvussu stóran part av røðuni, hann vildi tikið burtur, svarar Jenis – eftir at hava hugsað seg um eina løtu – at tað hevði ikki verið nógv eftir.

– Alt hatta politiska reypið hevði verið tikið burturúr, og so hevði ikki verið nógv eftir, sigur Jenis av Rana.

### Ongin tjóðveldisflokkur

Vit royndu fyrrapartin at fáa samband við umboð fyri tjóðveldisflokkin, í sambandi við nýggjársrøðu løgmans, men tað eydnaðist ikki

# Røðan er nýggjársheilsan

**– Nýggjársrøða løgmans flytir ongi mørk, men er meira ein nýggjársheilsan, sigur Edmund Joensen, løgtingsformaður og fyrrverandi løgmaður**

RØÐA

*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Vit skulu leggja ov nógv í nýggjársrøðuna, heldur Edmund Joensen, løgtingsformaður og fyrrverandi løgmaður. Tað skal skiljast soleiðis, at tað er ikki nýggjarsrøðan hjá løgmanni, sum flytir nøkur politisk mørk.

– Røðan er ein nýggjársheilsan til Føroya fólk frá løgmanni og landsstýri. Tað er vanligt at líta eitt sindur aftur og fram í tíðina. Skal tað vera tað, so verður røðan ikki nógv øðrvísi enn hana, vit hoyrdu nýggjársaftan, sigur Edmund Joensen.

Kanska ikki heilt óvæntað heldur Edmund Joensen, at røðan hjá løgmanni lýsti væl, hvat samgongan hevur sett sær fyri.

– Sum heild haldi eg, at nýggjársrøðan minnir um tær undanfarnu, sigur Edmund Joensen



*Nýggjársrøða løgmans skal ikki takast fyri meira, enn hon er, heldur Edmund Joensen. Hann helt sjálvur tríggjar røður á nýggjársaftan fyri Føroya fólki*

### Aftur og fram

Sjálvur helt Edmund Joensen tríggjar ferðir nýggjársrøðu. Hann sigur, at tað sum so ikki eru nakrar reglur fyri, hvussu tú skalt orða teg, ella hvat røðast skal um. Nýggjársrøða løgmans er komin á skránna eftir útlendskari fyrimynd.

Edmund Joensen heldur, at tað betri pláss fyri útgreiningum hjá løgmanni á ólavsøku.

– Eg sigi ikki, at røðan skal vera soleiðis sum hon er, men tá fortreytirnar eru sum tær eru, so er torført at gera tað øðrvísi, sigur Edmund Joensen.

# Fíggjarnevndin á vitjan

**Ì døgunum 4. til 7. januar kemur fíggjarnevndin hjá Fólkatinginum á vitjan í Føroyum**

VITJAN

*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Fíggjarnevndin hjá Fólkatinginum kemur í dag, týsdagin 4. juli, til Føroya. Tað er fyrst ferð í langt sámiliga tíð, at fíggjarnevndina leggur leiðina hesaferð.

Av løgtingsskrivstovuni siga tey seg ikki kunna minnast nær fíggjarnevndin hjá Fólkatinginum hevur verið á vitjan í Føroyum seinast, og heldur ikki Ríkisumboðið dugir at finna fram til, at Fíggjarnevndin hevur verið her áður.



*Kristian Thulesen Dahl er formaður fyri fíggjarnevndina hjá Fólkatinginum*

### Kunning

Dan Knudsen á skrivstovuni hjá Ríkisumboðnum sigur, at ferðin verður kallað fyri studie-rejse, og endamálið er kunning í breiðastu merking. Eitt ótal av fundum eru avtalaðir. Millum annað skal danska nevndin á fund við fíggjarnevndina, Landsbankan, løgmann, landsstýrismannin í fíggjarmálum og við Búskaparráðið.

Eingin føst dagsskrá er fyri fundirnar. Dan Knudsen sigur, at nevndin letur tað vera upp til føroysku fundarluttakararnar at kunna um síni viðurskifti.

Áhugin er heldur ikki tann størsti at koma við til Føroya. Bert sjey av seytjan limum koma við til Føroya. Dan Knudsen frá Ríkisumboðnum sigur, at hetta skyldast, at limirnir í fíggjarnevndini eisini eru limir í øðrum nevndum. Danski Javnaðarflokkurin eigur flestu luttakararnar í ferðalagnum. Nevnast kann, at einki umboð er fyri stóra stjórnarflokkin, Venstre.

Formaður fyri fíggjarnevndina hjá Fólkatinginum er Kristian Thulesen Dahl úr Dansk Folkeparti. Hann kom á breddan í Føroyum í summar í kjalarvørrinum á einum innslagi á sjónvarpsrásini TV2 um hýrunar hjá føroyskum fiskimonnum.